## Cahill úti við blóðproppi

Gary Cahill, sum í ár hevur sýnt stórspæl fyri Bolton, og sum eisini hevur snoddað til enska landsliðshópin, verður ikki at síggja á vøllinum restina av hesum kappingarárinum. Cahill mátti geva avboð til dystin hjá Bolton móti Fulham leygardagin, og nú er staðfest, at talan var um blóðtøpp. Og boðini frá læknunum eru púrasta greitt, at hetta krevur, at spælarin bindur frið í nakrar mánaðir.



## Portsmouth á eggini

Tríggjar ferðir í ár hevur Portsmouth fingið nýggjan eigara, men enn eru fíggjarligu trupulleikarnir hjá felagnum ikki loystir. Mikudagin fer Peter Storrie, stjóri, á fund við enska skattavaldið, og sjálvur sigur stjórin, at hetta er mest týðandi fundurin hjá felagnum nakrantíð. Fær Portsmouth ikki í lag eina gjaldsavtalu, tykist nærum víst, at felagið fer á húsagang.

### ÍF-SÍ 0-3 (17-25, 20-25, 23-25):

# Sørvingar hanga í

**Hóast menninir hjá SÍ slakaðu nakað í seinnu helvt av dystinum, samstundis sum ÍF kom meira við, broytti tað ikki úrslitið: Sum væntað, vunnu sørvingar**




Hilmar Jan Hansen



**Við útisigrinum á ÍF í gjár eru sørvingar komnir enn nærri FM-finalunum ímóti Mjølnir**
Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

SÍ er væl á veg í finaluna í Eik-liguni hjá monnum, sum allarhelst verður ímóti Mjølnir. Hesi bæði liðini hava stórt sæð alt kappingarárið verið leys av hinum báðum liðunum, og nú kappingin er farin at halla, er teoretiski møguleikin fyri, at nakar annar endar í finaluni, enn hesi bæði, minkaður niður í næstan einki.

Í gjár tók SÍ enn eitt stig ímóti finaluni, tá tað á Kambsdali eydnaðist at vinna 3-0 á ÍF, sum enn eigur fyrsta sigurin í vetur til góðar. SÍ, sum onkuntíð fyrr í vetur hevur sæð hálvhjartað út í dystum ímóti lægru liðunum, tóktist hesa ferð taka uppgávuna í størri álvara.

Tað koyrdi í øllum førum sera væl hjá sørvingum í fyrsta setti, sum teir vunnu trygt. Sum vanligt, stríddust teir hjá ÍF væl á gólvinum og fingu nógv uppaftur, men tað forðaði ikki fyri, at SÍ tók fyrsta settið.

### ÍF kom betur við

ÍF kom meira við í øðrum setti, men framvegis var SÍ við yvirlutan. Í seinna helmingi av settinum byrjaðu sørvingar at gera fleiri feilir og høvdu verri móttøkur, samstundis sum ÍF fekk meira álopsspæl, men kortini vann ÍF settið og var á odda 2-0.

Í triðja setti kom SÍ beinanvegin á odda 0-6, men ÍF svaraði skjótt aftur og fór framum 8-7. At SÍ enn ikki hevði fingið skil á móttøkunum aftur, gjørdi ÍF sær dælt av og stríddist fyri at vinna settið. Seint í settinum var ÍF á odda 19-18, áðrenn SÍ fór upp á 21-23. ÍF svaraði aftur og javnaði til 23-23, men kortini eydnaðist SÍ at taka settið og sigurin.

Sostatt gjørdist talan um trettanda ósigurin á rað til ÍF, ið enn eina ferð hevði gott verjuspæl og fekk nógv uppaftur, men kortini ikki megnaði at hótta nóg mikið, tí álopsspælið ikki hevur tilsvarandi styrki.

Fyri SÍ merkti sigurin, at bara eitt stig er upp til SÍ, samstundis sum seks stig eru niður til Fleyr, ið kemur til Sørvágs mikukvøldið. Vinnur SÍ tá, merkir tað samstundis, at liðið kemur í FM-finalurnar ímóti Mjølnir.

### ÍF-SÍ 0-3 (7-25, 13-25, 17-25):

# SÍ framvegis klárt á odda

**Tvey tey fyrru settini ímóti ÍF spældu SÍ-kvinnurnar mestsum uttan at gera nakrar feilir, og talan gjørdist tí um enn ein tryggan sigur til oddaliðið**




Hilmar Jan Hansen

Nú kappingin hjá kvinnunum er farin at halla, er SÍ framvegis oddaliðið. Fýra stig eru niður til næsta liðið, so í Eik-liguni hjá kvinnum er tað enn bara ein spurningur, hvør annar kemur í FM-finaluna, og har eru nú trý lið eftir, sum liggja framvið: TB, Mjølnir og Dráttur.

SÍ-kvinnurnar vóru í gjár gestir á Kambsdali, har ÍF tók ímóti, og dysturin fekk tað úrslitið, ið væntast kundi frammanundan. SÍ vann trygt – og spældi fyri tað nógva eisini sera væl.

Í fyrsta setti koyrdi alt hjá SÍ, meðan ÍF mestsum einki álop hevði. Spælið hjá gestunum var at kalla feilfrítt við góðum álopi og einum blokki, ið tók broddin av álopsroyndunum hjá ÍF, áðrenn tær veruliga komu í gongd. Nakað tað sama var eisini í øðrum setti, tá ÍF tó fekk betri móttøkur og so smátt byrjaði at fáa eitt sindur av álopi. Framvegis gjørdi SÍ fáar feilir og spældi væl.

Sum so ofta, tá eitt lið er á odda 2-0, dovnaði innsatsurin nakað í triðja setti, har ÍF í byrjanini var væl við. ÍF var á odda 13-10, men eftir at SÍ hevði havt »time-out«, vendist gongdin. SÍ fór framum 13-14 og hugdi síðani ikki aftur um seg, men koyrdi avstað.

Talan var sostatt um ein tryggan og avgjørdan sigur, har SÍ stóð fyri tí nógva. ÍF hevði millum lítið og einki at bjóða, ið kundi hótt SÍ, og tað avspeglar væl eisini stigatalvuna, har SÍ er klárt á odda og ÍF næstaftast, tvey stig framman fyri botnliðið, KÍF.